# Aðalfundur hjá Javna

**Aðalfundurin hjá Javna verður í Miðlahúsinum leygardagin 26. apríl kl. 15.00.**

Skrá sambært viðtøkum felagsins, m.a. nevndarval og formansval.

**Øll eru vælkomin**

SENDISTOVAN

Javni er felag, sum arbeiðir fyri góðum umstøðum til børn, ung, vaksin og eldri við menningartarni. Javni vil fegið hava eitt samfelag, har rúm er fyri øllum, og har øll kunnu hava eitt gott lív út frá egnum fortreytum og ynskjum.

javni – Virkin og virðismikil

Hoydalsvegur 40 · Postsmoga 1133 · FO-110 Tórshavn · Tlf. 31 48 27 · www.javni.fo



almannastovan
www.almannastovan.fo



## ALMANNASTOVAN SØKIR
## SAMFELAGSFRØÐING, LØGFRØÐING E.L.

Vit sóknast eftir einum fólki, ið hevur samfelagsfrøðiliga, løgfrøðiliga ella aðra hóskandi universitetsútbúgving ella hevur sosialráðgevaútbúgving við yvirbygningi á kandidat- ella masterstøði. Tað er ein fyrimunur at hava starvsroyndir innan fyrisiting á almannaøkinum.

Okkara ynski er, at viðkomandi er virkin og nærlagdur, hevur góð samstarvsevni og arbeiðir sjálvstøðugt við at loysa uppgávurnar í tráð við endamálið hjá stovninum og teir málsetningar, stovnurin hevur.

Arbeiðsuppgávunar fevna um ráðgeving og vegleiðing til leiðslu og starvsfólk, ummælan av uppskotum til lógir ...iðgerð í ávísum ...eiðbeiningum og kunningartilfari, luttøku í tvørfakligum samstarvi, skriving og samskipan viðvíkjandi málum um fyritíðarpensjón og aðrar uppgávur á deildini.

Starvið verður sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.

Fleiri upplýsningar um starvið fáast við at venda sær til Mariu Jacobsen, deildarleiðara á telefon 35 35 10.

Skrivlig umsókn við CV og próvskjølum skal verða Almannastovuni í hendi í seinasta lagi 20. apríl 2008.

Send umsóknina til Almannastovuna, Smyrilsvegur 20, Postboks 3096, 110 Tórshavn.

KREA

Á Almannastovuni virka vit miðvíst fyri at lúka krøvini frá politiska myndugleikanum og viðskiftafólkunum. Dentur verður lagdur á høgt tænastustøði, rættartrygdina og virðingina fyri einstaklinginum, eins og virkað verður fyri áhaldandi at menna førleikan, trivnaðin og samstarvið á stovninum. Tú verður partur av einum stovni, ið alla tíðina má tillaga seg broytingarnar í samfelagnum og taka við avbjóðingunum, sum liggja í tíðini og í framtíðini.

Á Stjórnardeildini eru tilsamans 6 starvsfólk. Starvsøkið hjá Stjórnardeildini fevnir um ráðgeving og vegleiðing til leiðslu og starvsfólk í sosialfakligum, løgfrøðiligum og øðrum fyrisitingarligum spurningum, ger av innanhýsis leiðbeinandi reglum og kunningartilfari, kæruummæli, ummæli av lógar- og kunngerðaruppskotum o.ø. Harumframt hevur deildin skrivara- og samskipanaruppgávur fyri pensjónsfundin, sum tekur avgerð um tillutan av fyritíðarpensjón.



# Montørur til FT Samskifti

"Skifta vit ikki kós, enda vit helst har, vit stýra"

Kinesiskt orðatak



**Søkt verður eftir montøri til Tænastudepilin á FT Samskifti í Tórshavn at byrja skjótast gjørligt. Arbeiðið er í stóran mun nýgerð, brekrætting og viðlíkahald av telefoninstallatiónum.**

**Vit kunnu bjóða eitt áhugavert arbeiði, sum umfatar:**

- Nýgerð, brekrætting og viðlíkahald av telefoninstallatiónum
- Vanliga telefonútgerð
- Vekslarar
- Innanhýsis kaðalskipanir
- Terminalar av ymiskum slag
- Internet, ISDN og ADSL
- At ráðgeva viðskiftafólk um kundaútgerð og tænastur.

**Útbúgving:**
Elektronikkmekanikari, elektrikari, líknandi útbúgving og/ella hollar royndir sum montør-/kaðalmaður.

Tann, ið sett/-ur verður, má kunna arbeiða sjálvstøðugt, verða opin og duga væl at samstarva og tosa við viðskiftafólk og hava royndir innan KT á brúkarastøði.

Uppmøtingarstaður er Klingran í Hoyvík og arbeitt verður í øllum Miðøkinum, tvs. Tórshavn, Norðstreymoy, Vágum og Sandoy.

Starvið er lønt sambært sattmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Starvsmannafelagið.

Áhugað kunnu venda sær til Bjørn M. Mortensen, bólkaleiðara, ella Elisabeth Carlsson, depilsleiðara á tel 30 30 30.

Umsóknir skulu vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi mánadagin 14. apríl 2008 og skulu sendast til:

**Føroya Tele**
Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
FO-110 Tórshavn

ella til:
starvsfolkadeildin@ft.fo

**FT Samskifti er dótturfelag Føroya Tele. Felagið rekur alla kundarøkt, alla sølu og alt samskifti við privat- og vinnukundar, alt GSM-økið og alla støðarútgerð fyri fastnetstelefoni og breiðband. FT Samskifti gevur nýggjar møguleikar at veita betri og bíligari tænastur til kundarnar. Í felagnum starvast 115 fólk. Tænastur frá FT Samskifti verða marknaðarførdar undir navninum Føroya Tele.**

FØROYA TELE
*Skapið framtíðina saman við okkum!*